# Óvanligur kavi

Í gjár var avkavað nógvastaðni á Suðurlandinum í Íslandi, og tað kom óvart á veðurmenninar. Ein teirra, Einar Sveinbjörnsson, sigur við Morgunblaðið, at tað er ógvuliga sjáldsamt, at kavi legst á Suðurlandinum so tíðliga um heystið. Eitt nú var hetta fyrstu ferð síðani 1926, at tað hevur verið avkavað í bygdini Kirkjubæjarklaustri um miðjan september. Kavin í gjár var tí eitt sjáldsamt veðurfyribrigdi, sigur íslendski veðurmaðurin.



*Í gjár var avkavað á Suðurlandinum í Íslandi, og tað er óvanliga tíðliga (Mynd: Morgunblaðið)*

# Samanleggingar í FSF-varpi

Klokkan 18.30 og í endursending klokkan 22 á Rás 1 hjá Televarpinum umrøður FSF-varpið ætlanirnar um at leggja fótbóltsfeløgini í Suðuroy saman. Um limirnir í feløgunum taka undir við at leggja saman, kunnu feløgini í Suðuroy vera vorðin eitt fótbóltsfelag longu í heyst. Gestir í sjónvarpsstovuni eru Jóan Petur Olgarsson, formaður í TB, og Magnus á Stongum, umboðsmaður fyri EB/Streym. Magnus greiðir frá samanleggingini í Sundalagnum, sum hevði við sær, at Sundalagið nú eigur eitt topplið í Formuladeildini. Hetta er 12. FSF-varpið í røðini.





*Ikki øllum íslendingum sóðu út til at dáma føroyska matin, ið borðreitt varð við á móttøkuni í býráðssalinum í Reykjavik*

*Mynd: Hørður Sveinsson*

fyri tí tónleikarliga innslagnum.

Aftan á móttøkuna í býráðssalinum varð merkið vundið í húnar hátt á sendistovuni, sum húsast í Austurstræti 12, og sendistovan lat upp fyri almenninginum.

Um kvøldið varð hildið fram í glassalinum uttanfyri Norrøna Húsið, har Budam, Jensina Olsen og Jógvan Hansen & Izafold undirhildu.

Sendistovan í Íslandi er tann fjórða í røðini av føroyskum sendistovum. Frammanundan hevur Føroyar sendistovur í Keypmannahavn, London og Brüssel.

# Løgmaður stórriddari í Íslandi



**Áðrenn sendistovan í Reykjavík læt upp leygardagin var løgmaður á gátt hjá íslendska forsetanum, har hann varð heiðrarð við stórriddarakrossinum**

**HEIÐUR**

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Tað var íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, sum sjálvur hongdi stórriddarakrossin um hálsin á løgmanni, sum hann segði var ein viðurkenning fyri arbeiðið hjá løgmanni at menna samvinnuna millum íslendingar og føroyingar.

Íslendski forsetin vísti í hesum sambandi á, at føroyingar lótu sendistovu upp í Reykjavík leygardagin. Forsetin segði seg vænta, at sendistovan fer at geva uppaftur størri møguleikar fyri øktum og fjølbroyttum samstarvi millum londini bæði.

Jóannes Eidesgaard, sum tvær ferðir hevur sagt nei takk til danska Riddarakrossin, er kortini fegin um at hava fingið íslendska Stórriddarakrossin.

Tað er siðvenja hjá javnaðarfólki ikki at taka ímóti heiðursmerkjum, men løgmaður valdi kortini at taka ímóti íslendska krossinum. Hann vísir á, at hesin ikki verður latin fyri eina støðu í føroyska samfelagnum, men fyri eitt avrik, ið løgmaður tilskrivar føroyska fólkinum.

*Her hongur íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, stórriddarakrossin um hálsin á løgmanni, sum eina viðurkenning fyri arbeiðið hjá løgmanni at menna samstarvið millum íslendingar og føroyingar*

*Myndir: Gunnar Geir Vigfússon*